# Fuglaveiðan í Mykinesi skal endurskoðast



## Mugu ikki gloyma kommunuskúlan

- Tað er sjálvandi neyðugt at menna ítróttin í kommununi. Men ein má ikki gloyma onnur átrokandi mál, m.a. hvat skal gerast við kommunuskúlan, sigur býráðslimurin Annfinn Brekkstein úr Sambandsflokkinum

Býráðslimurin vísir á, at Tórshavnar Kommuna hevur gjørt stórar íløgur í nýggjar skúlar í kommununi í seinastuni. Ein er bygdur í Hoyvík og ein verður liðugur at taka í nýtslu á Argjum í summar. Nú hevur eitt ávíst tjak tikið seg upp, hvørjar íløgur eru neyðugar at gera í býnum hesi komandi árini. - Men nú stendur eitt annað stórmál fyri, og sum eisini skal loysast – málið um Tórshavnar Kommunuskúla, vísir Annfinn á. - Skal hann rívast niður og byggjast ein nýggjur miðbýarskúli, ella hvat? - Vit mugu ikki gloyma, at tað standa næmingar, foreldur og lærarar spentir og bíða eftir næsta leiki frá okkum býráðslimum. Sjálvur dugir Annfinn illa at ímynda sær, at eingin skúli verður í miðbýnum í framtíðini. Ein nýggjur skúli kann geva fleiri møguleikar til økt mentanarlív og møguleikar til enn fleiri og spennandi tiltøk í miðbýnum. - Men alt hetta er so sanniliga eisini ein fíggjarlig avbjóðing fyri okkum í býráðnum. Rætta tíðin er ikki fyri øktum skattatrýsti á borgaran. Her mugu ynskini og tað fíggjarliga passa saman, sigur Annfinn Brekkstein.

Tey, ið hava áhuga fyri fuglaveiðu, fara helst við áhuga at fylgja við tí, sum fer at spyrjast burtur úr eini grannastevnu í Mykinesi um ein mánað.

Sýslumaðurin í Vágum, John Kruse hevur nú boðað frá, at ein grannastevna skal haldast í Mykinesi 3. juni.

Orsøkin til hetta er ein umbøn, sum átta ognarar í Mykinesi sendu sýslumanninum í oktober mánaði í fjør.

Evnið á grannastevnuni er hitt einfalda, men kortini týdningarmikla fyri fólkið í Mykinesi: Ætlanin er nevniliga at endurskoða viðtøkurnar fyri fuglaveiðuna í vestastu oyggj okkara.

Grannastevnan verður hildin fríggjadagin 3. juni, og byrjar hann klokkan 11 í bygdarskúlanum í Mykinesi.



## Í MORGIN




8-13 m/s 7-12 m/s

Andøvsgul upp í win strúk av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 8 og 11 stig.

## FRÍGGJADAGIN




8-13 m/s 8-13 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi og møguliga regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.

## LEYGARDAGIN




7-12 m/s 9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landsynningi og stundum regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1027 hPa. norðan fyri Føroyar fer vestureftir og mennist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið á 49N-26V stendur mestsum í stað, men brúgvaløgini haðani nærkast Føroyum hóskvøldið.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

29. apríl Mánin longst frá jørðini
3. mai Tendring
10. mai Fyrra kvarter
15. mai Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mai | 08:08 | 20:30 | 07:08 | 19:30 | 07:23 | 19:45 | 10:08 | 22:30 | 11:08 | 23:30 |
| 5. mai | 08:52 | 21:15 | 07:52 | 20:15 | 08:07 | 20:30 | 10:52 | 23:15 | 11:52 | - |
| 6. mai | 09:38 | 22:02 | 08:38 | 21:02 | 08:53 | 21:17 | 11:38 | - | 00:15 | 12:38 |
| 7. mai | 10:26 | 22:50 | 09:26 | 21:50 | 09:41 | 22:05 | 00:02 | 12:26 | 01:02 | 13:26 |
| 8. mai | 11:14 | 23:38 | 10:14 | 22:38 | 10:29 | 22:53 | 00:50 | 13:14 | 01:50 | 14:14 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mai | 06:23 | 18:45 | 05:23 | 17:45 | 08:23 | 20:45 | 09:23 | 21:45 | 07:53 | 20:15 | 09:08 | 21:30 |
| 5. mai | 07:07 | 19:30 | 06:07 | 18:30 | 09:07 | 21:30 | 10:07 | 22:30 | 08:37 | 21:00 | 09:52 | 22:15 |
| 6. mai | 07:53 | 20:17 | 06:53 | 19:17 | 09:53 | 22:17 | 10:53 | 23:17 | 09:23 | 21:47 | 10:38 | 23:02 |
| 7. mai | 08:41 | 21:05 | 07:41 | 20:05 | 10:41 | 23:05 | 11:41 | - | 10:11 | 22:35 | 11:26 | 23:50 |
| 8. mai | 09:29 | 21:53 | 08:29 | 20:53 | 11:29 | 23:53 | 00:05 | 12:29 | 10:59 | 23:23 | - | 12:14 |